UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Environment

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3 Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann 25. oktober 2024
J. nr.: 24/23961-4
Viðgjørt:
Tygara skriv:

Svar til skrivligan fyrispurning eftir § 52a í Tingskipanini frá Steffan Klein Poulsen, løgtingsmanni, um Minesto og sjóvarfalsorku.

Settu spurningarnir eru soljóðandi:

1. Hvør eigur og tískil umsitur vitanina (hagtøl, data v.m.), sum koma til høldar frá verkætlanini, sum SEV og Minesto varða av?
2. Rindar Minesto tilfeingisgjald ella líknandi gjald fyri atgongd til føroyska tilfeingið?
3. Fær SEV lut í einum møguligum fíggjarligum yvirskoti, um so er, at verkætlanin gerst vinnulig?
4. Hvussu langa tíð fevnir royndartíðin millum SEV og Minesto um?
5. Kunnu aðrar sjóvarfalsverkætlanir, útlendskar ella føroyskar, roynast í Føroyum í tíðarskeiðum, Minesto er virkið í Føroyum?
6. Hvussu leingi hevur SEV bundið seg til at keypa streym frá Minesto og til hvønn prís?

Svar til spurning 1

SEV hevur í samstarvi við Minesto fingið eitt 5 ára royndarloyvi á einum avmarkaðum øki í Vestmannasundi til at gera neyðugar forkanningar í sambandi við, at Minesto mennir sjódrekar og annan útbúnað til at framleiða el úr sjóvarfalsorku. Royndarloyvið í Vestmannasundi er galdandi til 28. februar 2025, og SEV og Minesto hava kunnað um, at ætlanin er at søkja um leingjan av royndarloyvinum, tí enn er ikki komið á mál við forkanningarvirkseminum.

Royndarloyvi kunnu sambært el- og fjarhitalógini í mesta lagi veitast fyri 5 ár í senn. Sambært loyvistreytunum, ger loyvishavarin eina frágreiðing um royndarvirksemið einaferð um árið, sum eisini vísir, hvussu stór elframleiðslan frá royndarvirkseminum hevur verið.

Minesto savnar og umsitur alla vitan (hagtøl, data v.m.) frá royndarvirkseminum, tí tað er Minesto, sum hevur ment sjódrekarnar og ta tøkni, sum stýrir drekunum. SEV skrásetur alla elframleiðslu hjá sjódrekunum. Byrjað var við tveimum smáum sjódrekum og nú vera royndir eisini gjørdar við einum væl størri sjódreka.

Nú tað nærkast at fyrsta 5 ára royndartíðarskeiðið rennir út, skal loyvishavin senda inn frágreiðing frá samlaða royndarvirkseminum. Frágreiðingin skal bæði lýsa tøkniligu royndirnar, avbjóðingarnar og samlaðu elframleiðsluna í royndartíðarskeiðnum umframt geva eina meting av útlitunum fyri framtíðar elframleiðslu úr sjóvarfalssorku við royndu tøknini.

Orkumyndugleikin kann almannakunngera innsendu upplýsingarnar, tó burtursæð frá teimum upplýsingum, sum eru trúnaðarupplýsingar sambært lógini um alment innlit.

Svar til spurning 2

Onki tilfeingisgjald verður rindað í sambandi við royndarvirksemið við sjóvarfalsorku í Vestmannasundi. Royndarvirksemi er fíggjarliga krevjandi virksemi, sum ikki gevur nakað búskaparligt yvirskot.

Svar til spurning 3

Virksemið hjá Minesto í Vestmannasundi byggir á eitt royndarloyvi, sum ikki kann umgerast til eitt vinnuligt framleiðsluloyvi. Higartil hevur elframleiðslan frá royndarvirkseminum bæði verið lítil og ósamanhangandi, tí nógvar tøkniligar tillagingar mugu javnan gerast av framleiðslu-tøknini, sum Minesto mennir í Vestmannasundi.

Skulu framleiðsluloyvi latast til at framleiða el úr sjóvarfalsorku á einum vinnuligum grundarlagi, krevur lógin alment útboð av slíkum framleiðslurættindum. Tá kunnu allir áhugaðir umsøkjarar, sum meta seg hava nøktandi førleikar, fíggjarorku og tøkni, bjóða seg fram at framleiða sjóvarfalsorku á útbodnu økjunum. Vinnarin av útboðnum verður tá loyvishavari, og viðkomandi loyvishavi fær tá eitt møguligt yvirskot av rakstrinum.

Endamálið við almennum útboði er m.a. at tryggja kapping um loyvisrættindini og at tryggja, at feløg ikki fáa ein ov høgan avrokningarprís. Viðmerkjast kann, at orkumyndugleikin hevur heimild at havna øllum innkomnum tilboðum í einum almennum útboði, um eitt nú avrokningarprísurin verður mettur at verða ov høgur, ella onnur týðandi viðurskifti gera seg galdandi.

Svar til spurning 4

Samstarvið millum SEV og Minesto byggir á eitt 5 ára royndarloyvi. Orkumyndugleikin er longu kunnaður um, at ætlanin er at søkja um nýtt 5 ára loyvi, tí enn er ikki komið á mál við ætlaðu royndunum í Vestmannasundi. Sí eisini svarið til spurning 1.

Svar til spurning 5

Aðrar sjóvarfalsverkætlanir, útlendskar ella føroyskar, kunnu roynast í Føroyum í sama tíðarskeiði, sum Minesto er virkið í Føroyum. Tó er ikki vist at rúm er fyri fleiri royndarverkætlanum í sama sundi ella firði, tá talan er um at gera royndir við sjóvarfalsorku.

Svar til spurning 6

Royndarloyvi og keypstreytirnar frá SEV um keyp av el frá royndarframleiðsluni hjá Minesto gongur fram til 28. februar 2025.

Framleiðsla av el úr sjóvarfalsorku inn á netið hjá SEV er partur av verkætlanini, tí eisini SEV hevur brúk fyri at gera sær royndir við at móttaka el úr sjóvarfalsorku inn á sínar skipanir.

Elprísurin er settur í mun til tann prís, sum elframleiðslan frá royndarvirkseminum kann fortreingja oljugrundaða elframleiðslu á Sundsverkinum, tó ikki minni enn 90 oyru/kWt. Hesin prísur er áleið tann sami, ið nýttur verður sum avrokning fyri sólorkuverk. Avtalan um keyp av el frá sjódrekunum hjá Minesto til nevnda prís gongur út, tá royndarloyvið gongur út.

Umhvørvismálaráðið, 25. oktober 2024

Aksel V. Johannesen
løgmaður